# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Hvar gongur markið fyri alment formyndarí?

Tað almenna átekur sær í summum førum at veita borgarunum serliga vegleiðing. Hetta verður til dømis gjørt á sigarettpakkum, har tað við stórum bókstavum verður gjørt vart við vandan at roykja. Alt gott um tað. Spurningurin er, hvar markið gonur, og í hvønn mun tað almenna skal ráðgeva.

Tað munnu vera tey heilt fáu, ið ikki vita, at eitt súrepli er betur fyri heilsuna enn leykasmelt. Hóast hetta velja nógvir borgarar at eta hetta seinna viðhvørt. Tað er eitt tilvitað val, sum ikki er grundað á vantandi vitan. Tað eru nógvir føroyingar, sum ikki renna dagliga. Er tað tí, at teir ikki vita betur? Man tað vera tí, at teir ikki vita av fólkaheilsurenningum? Neyvan. Tað er nú einaferð so, at einstaklingurin ræður sær sjálvum, og summi velja tilvitað ein sunnan livihátt í allar mátar, meðan summi velja ávís element frá, hóast tey vita betur. Kunning skal sjálvandi til í ein ávísan mun. Næmingar læra í fólkaskúlanum, at frukt og grønmeti er sunt, at tað er gott at røra seg, og at fyribyrging er neyðug. Tað man vera avmarkað, hvussu nógv meir landið fær gjørt.

Vit mugu ansa eftir, at vit ikki enda í somu grøv sum okkara grannalond, har sjálvfylgiligir faldarar er vorðið ein skattafíggjaður ídnaður, sum hevur óneyðuga nógv fólk í arbeiði. Eitt nú í Danmark, har tað almenna fyri nøkrum árum síðani hevði eina stóra skattafíggjaða kampanju um at eta meiri pasta, sum um borgarin ikki var heilt førur fyri at velja matskrá sjálvur. Ella enn verri sum bretska stjórnin, sum nýligani sendi ein faldara út, sum ávarar móti kulda um veturin.

Tað er ein niðurgerðing av borgaranum, tá man tosar við hann, sum var hann eitt barn. ES parlamentið hevur júst viðtikið, at allar billýsingar framyvir skulu hava eina ávaring eins og á sigarettlýsingum, har gjørt verður vart við, at bilurin dálkar og hvussu nógv hann dálkar. Eitt er kunning frá framleiðara um $CO_2$ nýtslu, sum er skilagott, men at ES parlamentið krevur eina ávaring um at bilar dálka, er tað sama sum at siga at ES borgarin er ikki serliga gløggur. Hvat verður tað næsta? Tað logiska vildi verið at skrivað ein ávaring á flogferðaseðlar, har gjørt verður vart við, at flogfarið hevur motorar, sum dálka. Hví ikki eisini skriva á fiskapakkar, at fiskurin ikki er fingin til vega við deyðsiglara?

Onkustaðni má mark setast fyri alment formyndarí. Tað er nú einaferð ein sannroynd, at um borgarin verður viðfarin sum eitt barn, so er vandi fyri, at sami borgari fer at halda, at alt sum ikki hevur eina statsávaring við stórum bókstavum á sær er óskaðiligt. Tað vildi av sonnum verið skaðiligt!

**Sosialurin**

## Eg kenni bara fimm vestmenningar

ÓLAVUR Í BEITI
rithøvundur



**so hatta ljóðar sera undarligt, at vestmenningar skulu avgerða, um vit í Vágum skula hava Vestmanna og Kvívík uppí Vágar í samanleggingini. Tað skulu vit í Vágum gera av!**

Nú hevði Útvarpið eini tíðindi sunnukvøldið, og sambært hesum, so eru sørvingar nøkur tvørball, meðan vestmenningar skulu taka støðu til, hvønn landslut teir fara at leggja saman við. Tað stendur alt upp til teirra at gera av!

Hetta var tað, sum eg fekk burturúr tíðindunum, og sambært heimasíðuni hjá Útvarpinum, sum hevur tikið samanum tíðindini, stendur:

"Eftir lógini um kommunusamanlegging skulu Vestmanna og Kvívíkar kommunur áðrenn 1. oktober 2009 velja, um tær skulu vera saman við Sundalagnum, sum eru Eiðis og Sunda kommunur, saman við Tórshavnar kommunu ella saman við Vágunum. Um ongin avgerð er tikin tá, tekur landsstýrismaðurin í kommunumálum avgerðina."

Útvarpið hevði so eisini eina viðmerking frá borgarstjóranum í Sørvági, Jákup Suna Lauritsen, og har var málið greitt lýst, at Sørvágur skal helst ikki hava eina fólkaatkvøðu fyrr enn greitt er felt á blað, hvat atkvøðast skal um. Miðvágur og Sandavágur hava longu ætlanir um at hava eina fólkaatkvøðu, men fram er ikki komið enn, hvør ella hvørjir spurningar verða settir á fólkaatkvøðuni. Tað fara vit kanska at fáa at vita seinni.

**Vestanstevnan**

Eg skilji ikki rættiliga, hvat tað er, sum ger, at Vestmanna skal verða ein sovorðin fongur hjá Vágoynni, og hvørji serlig bond eru millum Vestmanna, Kvívík og Vágar. Tað er ikki so mong ár síðani – kanska tá ið tosið byrjaði um kommunusamanleggingar – at Vestanstevnan gjørdist bert fyri Vágar. Í mong harrans ár var Vestmanna við í hesi stevnu, men tað er Vestmanna ikki meira, so tað kann ikki vera tað!

Tað er eingin orsøk at gera hetta mál um samanlegging truplut, tí tað er sera greitt. Vit hava oyggjar, summar smærri, summar størri, so tað eigur at vera arbeitt á annan hátt, enn at gera fløkjur og knútar og evjur. So áðrenn spurt verður um, hvar Vestmanna skal verða í framtíðini, so skal Vágoyggin spyrjast fyrst, um fólkið her í oynni vil hava samanlegging ella ikki. Vestmenningar skulu ikki avgera okkara framtíð, heldur enn Dímunarbóndin skal avgerða framtíðina hjá Jákupi Vestergaard og suðringum.

**Greitt**

Tá ið allar kommunurnar í Vágum – Sørvágs-, Miðvágs- og Sandavágs kommuna - hava atkvøtt um tær skula leggja saman, ja, so er málið greitt.

Tað er eingin grund at órógva hetta samstarv í oynni – hesa eind - og forpurra og øsa alla oynna við øðrum møguleikum, sum eru heilt burturvið!

Eg kenni bara fimm vestmenningar og einar tveir kvívíkingar, so eg skilji ikki rættiliga, hví vestmenningar og kvívíkingar skulu avgera okkara samanleggin her vesturi! Her man verða onkur fjald dagsskrá aftanfyri!

## Góðu veljarar kring landið!

Val



NITA NÆS
Hvalba, valevni Javnaðarfloksins

Eg játtaði at stilla upp til fólkatingsvalið, tí eg haldi, at vit aftur hava brúk fyri einum umboði úr Javnaðarflokkinum á fólktingi. Søguliga sæð hevur Javnaðarflokkurin altíð verið tann føroyski politiski flokkurin, sum hevur verið við til at funnið haldgóðar loysnir, so vit sum fólk og samfelag eru komin eitt fet víðari á sjálvstýrisleiðini.

Hetta gjørdu vit í 1948, somuleiðis við avtaluni um ráevnini í undirgrundini í 1992 og við Yvirtøkulógini í 2005 – hevur flokkurin tryggja, at sjálvstýrismálið nú er ein føroyskt søk.

Vælferð er eitt av flokssins aðalmálum. Vælferðin og trivnaðurin hjá fólkinum, sum her býr, eru grundarlagið undir allari støðutakan floksins – eisini teirru ríkisrættarligu.

Avbjóðingin hjá teimum, sum vald verða – er og verður – at tryggja og útbyggja vælferðina. Vælferð kostar og tí er ein av fortreytunum fyri at klára áhaldandi búskaparvøksturi, hvussu vit velja at vera við í altjóðagerðingini og hvussu vit klára at víðka okkara marknaratgongdir.

Altjóðagerðin krevur at partar vísa hvørjum álit, taka ábyrgd og sýna altjóðasamhaldsfesti.

Hugsa vit um Kyoto sáttmálan, so vil Javnaðarflokkurin halda fast um, at ásetingarnar í Kyoto avtaluni, um at minka útlátið við 8 %, verða hildnar.

Verður fólkatingsssessurin okkara, vil Javnaðarflokkurin beinavegin taka stig til eitt praktiskt samstarv, har Føroyar forhandla seg til, at ríksifelagsskapurin er og veður ein menn-andi tilgongd landanna millum - har forðingar, sum vit uppliva í dag, ið virka sum læstar hurðar, ongantíð ov skjótt verða beindar av vegnum.

Velur tú Javnaðarflokkin, velur tú samstundist: Jaligt samskifti og ítøkilig úrslit.

**Við javnaðarkvøðu**


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.